HEILSUMÁLARÁÐIÐ

4. desember 2020
Mál: 19/00987-57
Viðgjørt: BL

**Broytingar í komitélógini til hoyringar**

Hervið verður sent til hoyringar: uppskot til “Anordning om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af lov om videnskabsetisk behandling af sundhedsvidenskabelige forskningsprojekter.”

Komitélógin varð sett í gildi í Føroyum í 2013. Síðani eru fleiri broytingar gjørdar í lógini. Endamálið við hesum lógaruppskoti er at dagføra galdandi komitélóg, soleiðis at hon samsvarar við donsku lóggávuna á økinum.

Í lógaruppskotinum eru m.a. ásetingar um:

- At nærmasti avvarðandi ella verji kann samtykkja til luttøku í heilsuvísindaligari granskingarverkætlan, í førum, har granskingarluttakari ikki er førur fyri at samtykkja
- At ung, ið eru fylt 15 ár, skulu geva samtykki saman við foreldramyndugleikanum til at luttaka í heilsuvísindaligari granskingarverkætlan
- At granskari skal hava rætt til at innheinta neyðugar heilsuupplýsingar um granskingarluttakara, tvs. at granskari framyvir ikki longur hevur beinleiðis atgongd til at fáa víðarilatið heilsuupplýsingar um granskingarluttakara
- At persónar, ið viðgera umsóknir um góðkenning av heilsuvísindaligum granskingarverkætlanum, ikki mugu hava fíggjarligan ella annan áhuga innan heilsuvísindaliga gransking, sum kann ávirka teirra gegni
- At Vísindasiðseminevndin kann áleggja granskara at kunna granskingarluttakarar um møguleikar hjá hesum at fáa endurgjald, tá ið Vísindasiðseminevndin metir, at granskingarluttakarin kann hava rætt til endurgjald
- At heilsuvísindaligar granskingarverkætlanir, ið viðvíkja brúk av viðkvomum bioinformatiskum upplýsingum (sokallað ”turr data”), herundir verkætlanir við genomupplýsingum, skulu fráboðast Vísindasiðseminevnd. Tað hevur ikki verið galdandi fyrr at granskingarverkætlanir, sum bara innihalda upplýsingar um ”turr data”, skulu fráboðast til Vísindasiðseminevnd. Á donskum verða hesar granskingarverkætlanir kallaðar: “sundhedsdatavidenskabelige forskningsprojekter”.

**Vinaliga send viðmerkingar tykkara til hjálagda lógaruppskot til Heilsumálaráðið á teldupostadressu hmr@hmr.fo í seinasta lagi 11. januar 2021.**

Vinaliga

Birita Ludvíksdóttir
løgfrøðiligur ráðgevi

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn • Tel: +298 304050 • hmr@hmr.fo